sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkustjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari, uppsetning og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum

Postadr.: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Torførar og týdningarmiklar samráðingar

Oddagrein

TÝSDAGIN verður eitt nýtt samráðingarumfar í ósemjuni um markið. Fundurin verður í Føroyum og er hann beint í kjalarvørrinum á nøgvum virksemi á "oljufrontinum", sum hevur verið seinastu tíðina. Umboð fyri seks stór altjóða oljufeløg hava júst verið í Føroyum fyri at heilsa uppá tey fólk, sum hava tilknýti til olju- og undirgrundarmálið.

HELST hava feløgini hava gjørt vart við, at tey siggja fegin, at marknatrætan verður loyst so ella so. Verður hon ikki loyst til ta tíð, tá oljufeløgini skulu til at søkja um loyvi at gera kanningar og bora, er greitt, at her stinga nakrir trupulleikar seg upp. Tað kann tá henda, at oljufeløgini sleppa ikki at leita í teimum økjunum, sum strið er um, og sum kann vísa seg eru tey mest áhugaverdu økini. Men søgan sigur okkum, at oftani verður oljan funnin, har ein minst roknaði við tí.

HAVANDI hetta í huga og tey annars rættiliga viðgongdu bretsku krøvini til júst tey økini, sum oljufólk í dag halda vera mest áhugaverd føroysku megin miðlinjuni, er greitt, at tað hvílir ein ómetaliga stór og tung ábyrgd á teimum fólkum, sum samráðast vegna Føroyar í hesum máli.

LØGMAÐUR hevur róst tí arbeiði, sum hesi fólkini við formanninum Árna Olafsson á odda standa fyri,meðan onkur ikki hevur verið so fegin um úrslitini hjá nevndini. Hetta kom m.a. til sjóndar undir samráðingunum um borgarligt landsstýri í fjør, tá ein av fremstu sambandsmonnunum kravdi at fáa við í samgonguskjalið eina ultimativa støðu móti bretum,nevniliga hana, at vit ætlaðu okkum ikki at víkja ein tumma.

Í dag kunnu vit so spyrja, hvør hevur rætt og hvat er rætt at gera, nú tað nærkast degnum, tá føroyskir myndugleikar skulu til at bjóða út øki til útlendsk feløg. Vit eru fullgreið yvir, at uppgávan hjá nevndini er ómetaliga torfør. Hon er í mongum førum at meta sum eitt tvíeggjað svørð. Vilja vit eina samráðingarloysn, so merkir tað, at tú eisini mást taka hædd fyri nøkrum av tí, sum hin parturin krevur. Og er tað so, at oljan, um hon er har, er beint vestan fyri miðlinjuna, so kunnu vit rokna við, at tað verður júst hetta økið, sum vit møguliga skulu lata bretum við eini samráðingarloysn. Vilja vit sleppa undan at geva nakað, so kunnu vit fara til Haag. Men tað verður so sum at spæla í lottaríinum ella sum at spæla hasard, tí ein dómur har, kann verða verri enn ein samráðingarloysn. Tvinnir eru kostnirnir, hvørgin er mjúkur. Henda ógvuliga trupla støða setir sera stór krøv til okkara fólk, og vit mugu vóna, at tey - og politikararnir - megna at sigla millum skerini og fáa tað mesta av fonginum við heim. Her ræður um vitan, skil og hegni.

Sosialurin

Lesarabrøv

Sethúsaeigararir og samfelagið

Landsfelagið fyri Sethúsaeigarar hevur havt aðalfund. Fundurin valdi somu fólkini aftur í nevndina, roknskapurin varð góðkendur og limagjaldið varð ásett til 100 kr. um árið.

Sjálvt um uppmøtingin ikki var serliga stór, so fingu vit eitt livligt kjak um tað, ið fyri ferst. Vit fara at kunna um niðurstøðuna av fundinum, tí vit meta hetta vera tað, ið fólk flest hugsa og halda, tó at tað kanska ikki altíð kemur so greitt fram í fjølmiðlunum og almennum málgøgnum, teir hava víst sitt at kela fyri.

Fyrst av øllum mugu vit ásanna, at einki ítøkiligt enn er gjørt til at hjálpa uppá støðuna hjá teimum, sum eru komin illa fyri av kreppuni. Tann miðvísa útarmingin hevur ongantíð verið so sjónlig sum nú. Eins og í happadráttinum eru tað nøkur fá, ið vinna, restin hevur ongan kjans.

Tosað verður nógv um hjálp, seravtalur, sanering, arbeiðsskapandi tiltøk og annað úr somu skuffu, ótaldar ferðir eru vit farin um botnin, og hava byrjað uppferðina. Tíverri, alt hetta tosið er bara útgjarnig fyri at halda lokinum niður á eina løtu afturat. Ikki ein tann einasta framgongd fyri vanliga borgaran er í eygsjón.

Vit hövdu myndugleikar, sum undirgravaðu samfelagið fyri læntan pening, og nú bera teir tað til gravar.

Fíggjarmálaráðharrin lovar fleiri 100 milliónir í skattalætta næsta ár. Tað er ófort, men her fara vit at líta at veruleikanum.

Vit hava bjargað bankakervinum, tí fór tað, so fór alt. Nú drepur peningakervið okkum afturfyri.

Vit samlaðu flakavinnuna í eitt felag og saneraðu alt í senn, annars fór vinnan í sor.

Fiskasølan varð effektiviserað, tí sum var fingu vit ov lítið fyri okkara heimsins besta fisk. Effektiviseringin var so effektiv, at hvør útróðrarbátur nú fær meira fyri veiðuna á onkrum brúgvarkanti í Írlandi ella Skotlandi, enn hann fær í Føroyum.

Fyri at vissa okkum sum best bóðu vit aftur til skiparar teir, sum í verki høvdu prógvað, at teir saktans kundu kollsigla, hvat tað so enn skuldi verið. Omanfyri, til at stýra greyt heilunum, kapraðu vit so nakrar útslitnar danskar pensionistar, so kundu fólk grenja um tað.

Ætlanin var skotsikkur og úrslitið ikki óvæntað.

Fiskasølan livir av náði frá Den Danske Bank, um teir ikki longu hava kappað høvdið av henni. Fiskavirking skal sanerast minst 200 milliónir afturat.

Bankin, sum fekk allar ognir okkara, og sum skuldi verða tann drívandi megin í endurbyggingini, hevur onki uttan rasistiska vanvirðing til okkara.

Nakrir politikarar vísa á, at hóast kreppu, so hava vit megnað at varðveita vælferðarsamfelagið, men vælferðin í hesum samfelagi er grundað á ein sosialpolitikk eftir prinsippinum um, at hin versti sættar sínum. Eini sethúsaloysn hava vit bíðað leingi eftir, nú er hon her, politikarar hava helst so fræga inntøku, at teir fáa nakað burturúr, og so bankin, ikki at gloyma tann kæri bankin, meðan nærum øll onnur gerast verri fyri, tað mundi nokk eisini vera ætlanin.

Saneringin á sethúsamarknaðinum kemur bara teimum til góðar, sum nú fáa keypt sær eini bilig hús, hin óheydnismaðurin, ið misti húsini, fær ikki nakra sanering, men ómaná skuldina skal hann eisini gjalda kostnaðin av tvingsilssøluni. Tað er soleiðis, rættarsamfelagið virkar, tá tað er best.

Kanningar fáa vit eisini, bæði bankakanning og kanning um møguligt landssvik. Mætur sjónleikur, onnur orð finnast ikki til at lýsa hetta. Áðrenn politikarar fara í summarfrí, kundu teir hóskandi biðið danir um loyvi til at gera eina skipan, ið loftar teimum, ið hava mist hús og heim, og ikki hava pening til at leiga ella keypa nýggjan bústað. Somuleiðis áttu teir eisini at hugsa um tey, sum ikki verða hjálpt av sethúsaloysn løgtingsins, hvørgin av hesum bólkum hevur tíð til at bíða eftir fleiri 100 milliónа skattalættanum næsta ár, hjálp er bráðneyðug.

Tá grundlógin kann nýtast til at forða fyri avskriving av privatari skuld, mátti hon eisini kunna verið nýtt til at forða fyri, at fólk verða koyrd út á berajól.

Grein 1 í lýsingini um mannarættindi staðfestir, at øll hava fingið vit, skil og samvitsku, ja, tað ljóðar ótrúligt, men hvussu hevði verið at grivið hesar eginleikar fram og handlað hareftir.

Landsfelagið fyri Sethusaeigarar
Susanna Dam

Fólkaítakið

Nú verða undirskriftirnar, sum innkomnar eru til Fólkaítakið fyri tjóðfundi, sendar til Margretu drotning og ST-aðalskrivaran Boutros Boutros-Ghali.

Fyri at taka saman um verðurr hildin ein fundur í Havn í kvøld. Fundurin verður sostatt í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið tann 9. juni 1995 kl. 19.30.

Á skránni verður frágreiðing um tað, sum higartil er hent í hesum máli, og hvussu ætlingin er at fara fram nú.

Orðið verður frítt og høvi verður at seta spurningar.

Hesin fundur er fyri undirritararnar. Ikki bert tey, sum undirritað hava, eru vælkomin, men eisini tey, sum vilja vera við í ítakinum við at undirrita á fundinum.

Nevndin fyri Fólkaítakinum fyri tjóðfundi

Liggjas í Bø
Maria Jacobsen
Hans Tausen Olsen
Eiríkur Simonsen
Olaf á Stonggunum
Zakarias Wang

FØROYA FÓTBÓLTSSKÚLI

Tilmeldingarskjal 1995

Torshavn ☐ Klaksvík ☐

Navn: ______ Fødd/ur: ______

Gøta: ______ Telefon: ______

Bygd/bý: ______

Útileikari ☐ Málverji ☐

Foreldur ______ Tlf. heima ______ / Tlf. arb ______

Sjúkrakassi, nr. ______ Faðir/móðir ______

TÓRSHAVN
29. juni–1. juli

KLAKSVÍK
6.–8. juni 1995

______
(undirskrivt foreldur/verji)

Minnst til at seta kross við tann skúlan, tú ynskir at koma í.

Tilmelding skal vera FSF í hendi í *seinasta lagi 12. juni 1995*.

Latið tilmeldingarskjalið inn saman við inngjalding á posthúsi ella peningastovni